TING-HELLAN

# Útbúgving su



TINGHELLUANALYSAN
*Bogi Eliasen*



Ein av hornasteinunum í 2015 er útbúgving. Útbúgving er soleiðis sett út í kortið til at verða eitt av seks økjum, Føroyar skal seta sum eitt mál fyri 2015.

*Í nógv ár hevur útbúgving verið á breddanum í føroyskum politikki. Og hóast framgongd, soleiðis at vit umframt kravda fólkaskúlan, hava fleiri yrkisútbúgvingar, miðnámsútbúgvingar og Fróðskaparsetrið tørvar ein beinleiðis ætlan, har útbúgving ella ávísar útbúgvingar eru ein neyðugur partur í eini samfelagsstrategi fyri at flyta ella lyfta samfelag á eitt ávíst støði, ella at innrættað tað á ein ávísan hátt, hava vit ikki sæð nógv av.*

## Grundarsteinur

Útbúgving er bæði hønan og eggið. Útbúgving er grundarsteinurin undir at menna samfelagið, og í heimshøpi er okkara grundútbúgvingarstøði í betra endanum. Men fyri at koma víðari, fyri at fyrireika seg til avbjóðingina alheimsgerðin er, skal fokus flytast frá nøktandi til at verða fremst á einstøkum økjum. Er ella fáa vit eina semju um at raðfesta nøkur øki, skal útbúgvingarpolitikkurin lagast eftir tí. Fyri at menna seg sum eitt vitannarsamfelag, er neyðugt við bæði sterkari grundútbúgving og serkunnleika.

## Raðfesting

Er ætlanin t.d. at raðfesta ílegugransking, alternativa orku og náttúruna í og kring Føroyar, er helst skilabest at raðfesta og styrkja støddfrøðið og náttúruvísindi longu í fólkaskúlanum. Alheimsgerðin hevur við sær meira beinleiðis samband úteftir, og har hava myndugleikarnir júst raðfest at byrjast skal fyrr við frálæru í enskum, sum eina avleiðing av hesum.

## Útisetar ella heimføðingar?

Føroyar er eitt lítið land, og tí kunnu vit ikki rokna við at hava allar tær útbúgvingar heima í Føroyum, sum samfelagið hevur tørv á. Tí skal eitt kjak um føroyskan útbúgvingarpolitik eisini snúgva seg um hvørjar útbúgvingar vit eiga at hava í Føroyum, og hvørjar best er at lata fólk taka aðrastaðni, men eisini verða við í tilgongdini at fáa fólk aðrastaðir at útbúgva seg og at útbúgva seg á økjum sum føroyska samfelagið hevur tørv á. Her verður eisini hugsað um tað frálíka arbeiði Altjóða Skrivstovan er farin undir, við at spjaða føroyingar meira kring knøttin. Í hesum sambandi kemur eisini upp spurningurin, um vit fáa fólkini heimaftur, ella í hvussu stóran mun vit fáa tey heimaftur. Ætlanir og skipanir eiga at gerast, so bæði yvirlit er á hvørjar útbúgvingar føroyingar taka og hvørji koma heimaftur. Vísir tað seg, at vit ikki fáa fólk heimaftur, er alneyðugt at seta í verk skipanir, fyri at broyta tað.

## Eftirútbúgvingar

Men útbúgving er meira enn tað. Útbúgving er eisini eftirútbúgving og umskúling av fólki, sum longu eru á arbeiðsmarknaðinum og sum kanska eisini hava eina útbúgving. Tí er eisini neyðugt at umhugsað, hvussu vit styrkja og menna arbeiðstakaran, soleiðis at hann er førur fyri at menna seg við samfelagnum. Vitannarsamfelagið merkir eisini, at útbúgving er ein partur av øllum lívinum, og ikki bert ein partur av ungdómsárunum. Ein slík tilgongd mennir eisini ein fleksiblan arbeiðsmarknað, sum klárar broytingar og nýggjar avbjóðingar

## Útbúgving í Føroyum

Í samband við útbúgving í Føroyum er tí ikki nøktandi bert at hugsað um fólkaskúlan, ella bert yrkisútbúgvingar. Hugsast skal um útbúgving sum eina heild, umvegis fólkaskúlan og teir møguleikar sum so skulu verða tøkir. Tað skal verða bæði heilsuskúlin á Tvøroyri til ætlan um at fáa fleiri Ph.D. lesandi á útlenskum universitetum, sum føroyska samfelagið aftaná kann fáa gagn av. Tí er ein av grunnleggjandi spurningunum; skulu vit styrkja grundútbúgvingina og soleiðis lyfta minstastøðið, ella skulu vit satsa uppá servitan og gransking á t.d. Granskingardeplinum og Fróðskaparsetrinum.? Ella skal tað verða eitt býti? Fyri at kunna kjakast um og raðfesta útbúgvingarleist og ætlan, er altneyðugt at vita hvat endamálið er. Útbúgving er eitt amboð, m.a. til at skapa eitt ávíst tilætlað samfelag og ikki endamálið í sjálvum sær.

## Deplar?

Ofta verður kjakast um tað er skilagott at hava útbúgvingar kring landið. Komandi árini verður undirstøðikervið eisini ment so mikið, at øll samfersla í nýggja meginøkinum gerst munandi lættari og skjótari. Tað skal takast við í framtíðarvisjónunum um útbúgvingar. Vit hava nú sæð kjakið um HF skal verða í Klaksvík ella verða ein partur av Kambsdali, nú undirsjóvartunnilin kemur. Júst hesin orðadrátturin er eitt gott dømi. Fægstu ivast í, at kostnaðurin av at flyta skúlan á Kambsdal gerst minni og lættari er at brúka undirvísingarorku á staðnum o.s.fr. Men tað kann verða, at HF í Klaksvík hevur eitt jaligt árin á Klaksvík sum bý. Hinvegin so má treytin fyri at brúka so nógva samfelagsorku uppá undirstøðikervið eisini merkja, at tað skal brúkast í samfelagsmenningini, og tí skal føroyingurin eisini venja seg við at ferðast fyri at koma í skúla ella til arbeiðis.